VEÐRIÐ

Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið



Veðrið í dag:
Lot til andøvsgul av útsynningi og suðri og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 6 og 9 stig.



Veðrið hósdagin:
Andøvsgul upp í ein strúk av eystri og landnyrðingi og fyrrapartin møguliga regn. Annars lot av ymsum ættum, turt og sólglottar. Hitin milum 8 og 11 stig.



Veðrið fríggjadagin:
Gul til stívt andøvsgul av útsynningi og ælingur, men eisini sólglottar. Hitin millum 5 og 8 stig.

Veðrið leygardagin og sunnudagin:
Gul til stívt andøvsgul av útnyrðingi ella av ymsum ættum og ælingur, men eisini sólglottar. Hitin millum 4 og 8 stig.

Fyll tangan – Hugsa positivt!

Tíðindaskriv

Í døgunum 13., 14. og 15. mai vitjar kendi danski mentalvenjarin Carsten Sommerskov í Føroyum, har hann fer at halda skeið í Klaksvík, í Fuglafirði og í Havn.

Carsten Sommerskov er ein av kendastu undirvísarum innan positivan hugsunnarhátt, samstarv og samskifti, ið danir eiga. Seinastu 20 árini hevur hann verið ein hin fremsti frálærarin innan mentalvenjing og verður brúktur av flestu donsku vinnulívsfyritøkum, ið ynskja at fáa glað og positivt hugsandi starvsfólk í øllum liðum. Og hann prógvar ferð eftir ferð, at hansara teoriir og virkisháttur virkar.

Og allir stovnar og allar fyritøkur hava tørv fyri starvsfólki, ið hugsa positivt. Menniskju í vøkstri skapa vøkstur og tí ræður tað um at brúka tað biologisku telduna, heilan, á rættan hátt, til at stýra eins egna lívi. Tað er hvørki stjórin ella hjúnafelagin, ið stýrir tínum lívi – tað er bert tín egni heili og tann háttur, tú sjálvur velur at liva, ið ávirka tín egna atburð og gerandisdag.

Og Carsten Sommerskov er sannførdur um, at tú kanst læra at hugsa positivt. Á skeiðunum, ið Carsten fer at halda í Føroyum, fer hann at læra um hesar teknikkir, ið gera teg sjálvan meiri positivan og harvið betri, bæði sum privatpersón og á arbeiðsplássinum.

Hvør menniskja eigur at taka ábyrgd av sínum egna lívi. Eingin ennar ger tað fyri ein. Um tú heldur at tað eru onnur, ið hava skyldina av, at tú ert stressaður, manglar orku og hugsar negativar tankar, so kann tað møguliga vera rætt – men tað er bert ein, ið kann broyta uppá støðuna. Og tað er tú sjálvur.

Skeiðini hjá Carsten Sommerskov vara í 3 tímar og kosta 860,00 + meirvirðisgjald. Við í prísinum fæst eisini bókin: »Surfing på toppen af livet« ið Carsten hevur skrivað, og sum kann brúkast sum eitt amboð til at læra teir teknikkir, ið hann greiðir frá á skeiðunum. Skeiðsprísurin inniheldur eisini sodavatn og smyrjibreyð í steðginum.

Skeiðini skapa stutt sagt: Arbeiðsgleði, trivnað og positivitet!

Tað er felagið IRIS í Klaksvík, ið hevur fingið Carsten Sommerskov til Føroya, og vónar IRIS at stórur áhugi verður fyri at luttaka á teimum trimum skeiðunum, ið verða hildin á Tekniska Skúla í Klaksvík týskvøldið tann 13.05., í Mentanarhúsinum í Fuglafirði mikukvøldið tann 14.05. og á Hotel Føroyum í Havn hóskvøldið tann 15.05.2003 frá kl. 19.00-22.00.

Hitalagið kring knøttin

Illulisat	5
Nuuk	6
Qaqortoq	2
Ammassalik	--
Saint John's	7
Halifax	10
Reykjavík	5
Seyðisfjørður	1
Tórshavn	6
Lerwick	9
Aberdeen	13
London	16
Tromsø	8
Bergen	11
Oslo	--
Stokkhólm	12
Keypmannah.	15
Helsinki	12
Moskva	13
Berlin	24
Warzawa	21
Kiev	16
Bukarest	22
Paris	13
Madrid	20
Róm	26
Malorca	18
Athen	27
Malta	25
Tunis	27
Beijing	25
New Dehli	36
Bangkok	36
Jakarta	33
Sydney	20
New York	14
Miami	29
Los Angeles	17
Meksikobýur	28
Panama	--
La Paz	14
Rio de Janeiro	--
Buenos Aires	13

LUFTTRÝSTIÐ



Í gjár:
Ein hátrýstryggur, 1014 hPa. norðanfyri Føroyar fer spakuliga í landsynning. Eitt lágtrýst, 991 hPa. vestan fyri Ísland fer eystureftir og brúgvalagið haðani verður yvir Føroyum mikunáttina.

Í dag:
Lágtrýstið vestan fyri Ísland stendur mestsum í stað. Lágtrýstið vestan fyri Írland fer í landnyrðing og kann geva nakað av vindi og regni hósdagin.

HITALAGIÐ



Hitalagið mált frá 05/05 kl. 06⁰⁰– 06/05 kl. 06⁰⁰. Hitin í gjár: 4,8°
Minsti hiti máldur í mai: ÷3,0° Mesti hiti máldur í mai: 19,7°

AVFALLIÐ



Avfallið: 0,7 mm – mált frá 05/05 kl. 06⁰⁰–06/05 kl. 06⁰⁰
Avfallið higartil í mai: 22,9 mm



VESTFALLSKYRRINDI

9. mai: Fyrra kvarter

Kelda: Almanakkin 2003

Dagur	Suðuroyar-/Vágafirði fp.	sp.	Skúvoyar-/Skopunarfirði fp.	sp.	Hestfirði/Sundalagnum fp.	sp.	Vestmannasundi fp.	sp.	Mykinesfirði fp.	sp.	Nólsoyarfirði fp.	sp.	2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp.	sp.	Leirvíksfirði/Haraldssundi fp.	sp.	Kalsoyar-/Svínoyarfirði fp.	sp.	Hvannasundi fp.	sp.	Fugloyarfirði fp.	sp.
7. mai	11.52	—	10.52	23.16	11.07	23.31	01.28	13.52	02.28	14.52	10.07	22.31	09.07	21.31	—	12.07	00.43	13.07	11.37	—	00.28	12.52
8. mai	00.16	12.39	11.39	—	11.54	—	02.16	14.39	03.16	15.39	10.54	23.18	09.54	22.18	00.31	12.54	01.31	13.54	00.01	12.24	01.16	13.39
9. mai	01.03	13.40	00.03	12.40	00.18	12.55	03.03	15.40	04.03	16.40	11.55	—	10.55	23.32	01.18	13.55	02.18	14.55	00.48	13.25	02.03	14.40
10. mai	02.17	14.53	01.17	13.53	01.32	14.08	04.17	16.53	05.17	17.53	00.32	13.08	12.08	—	02.32	15.08	03.32	16.08	02.02	14.38	03.17	15.53
11. mai	03.29	15.51	02.29	14.51	02.44	15.06	05.29	17.51	06.29	18.51	01.44	14.06	00.44	13.06	03.44	16.06	04.44	17.06	03.14	15.36	04.29	16.51

5 707265 100036 >